## Beckham hugsar bert um pengar

Portugisiski fótbóltsvenjarin José Mourinho ger nú aftur vart við seg. Nú sigur hann við ESPN, at Beckham bert fór til USA at spæla fyri pengarnar, hann fekk afturfyri. – Um støðið á fótbólti í USA skal hækka, so krevur tað meira enn bert ein góðan spælara, sum fyrst og fremst hugsar um pengar, fyri at hækka støðið, sigur Mourinho. Í løtuni spælir David Beckham fyri AC Milan, men hann skal aftur til USA, tá italska kappingin er liðug.



## City vil leiga Hart út

Manchester City hevur nógvar málmenn at taka av. Gunnar Nielsen var í farnu viku leigaður til Wrexham, og City umhugsar nú eisini at leiga Joe Hart út. Hart var fyrstimálmaður í City, áðrenn felagið keypti Shay Given. – Vit hava brúk fyri talentinum hjá Joe Hart, og hann verður ein fantastiskur málmaður, men hann hevur brúk fyri at spæla, sigur venjarin Mark Hughes.



# Frakland hongur enn í

**Frakland helt lív í HM-vónini við einum teprum sigri á Litava. Serbia er á odda, aftaná ein framúrskarandi sigur á Rumenia**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað er stuttligari at fylgja føroyska A-landsliðnum nú. Í fjørheyst fingu vit ein góðan javnleik ímóti Eysturríki og fyri stuttum vunnu vit á fyrsta sinni á Íslandi. Og tað ger ikki stuttleikan minni, at vit eru í einum sera spennandi undankappingarbólki, har nógv enn kann henda.

*Franck Ribery bjargaði Fraklandi og venjaranum, Raymond Domenech, tá hann leygarkvøldið skoraði sigursmálið ímóti Litava*

### Domenech yvirlivdi

Franski landsliðsvenjarin, Raymond Domenech, hevur verið illa skeldaður av fronsku ítróttarpressuni fyri síni vantandi úrslit, men franska fótbóltssambandið hevur tó valt at hildið fast við Domenech.

Tað gav úrslit leygardagin, tá Frakland á útivølli vann ein tepran, men sera týdningarmiklan 1-0 sigur á Litava í HM-undankappingarbólki 7. Franck Ribery skoraði sigursmálið miðskeiðis í seinna hálvleiki, og "Les Bleus" hóma aftur annaðplássið í undankappingarbólkinum.

### Málríkt í Rumenia

Rumenar vóru trýstir til heimadystin ímóti Serbia. Tað var alneyðugt hjá rumenum at fáa trý stig, men alt endaði við, at serbar fóru avstað við øllum.

Serbia kom eisini best frá byrjan. Milan Jovanovic var fyrstu á einum returbólti, og hann beindi hann í netið til 1-0, og tá vóru bert 18 minuttir farnir av dystinum. Heimaliðið gav sær sjálvum eina bratta mótbrekku, tá Dorel Stoica stutt undan steðginum gjørdi sjálvmál, eftir eitt hornaspark hjá Serbia.

Stutt eftir steðgin kom Rumenia inn aftur í dystin, tá Ciprian Marica endaði eitt vælspælt álop við at lyfta bóltin upp um serbiska málverjan og í málið til 1-2. Men tá Branislav Ivanovic økti til 3-1 til Serbia, gjørdist ov tungt hjá Serbia

Dorel Stoica fekk kortini pyntað um úrslitið, og bøtt um skaðan við sjálvmálinum, tá hann minkaði um munin til 2-3, men tað rakk ikki, og Rumenia hevur bert 4 stig, aftaná 4 dystir.

Mikukvøldið spæla Eysturríki og Rumenia í Wien, í einum dysti, sum er síðsta útkall hjá báðum londum. Sama kvøld tekur Frakland ímóti Litava. Háspenningur er í bólkinum, og spennandi verður eisini at síggja hvønn leiklut Føroyar fer at spæla í øllum dramatikkinum, sum liggur fyri framman.

# Beckham setti met

**David Beckham er nú tann útispælarin, sum hevur spælt flest landsdystir fyri Ongland**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Leygardagin spældi Ongland venjingardyst ímóti Slovakia. Ongland vann 4-0, eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Stórsigurin kom tó at standa í skugganum av, at David Beckham tók metið frá Bobby Moore, sála, sum var útispælarin, sum hevði spælt flest landsdystir fyri Ongland.

Gamla metið hjá Bobby Moore var 108 landsdystir, men metið reyk, tá David Beckham kom inn í øðrum hálvleiki, fyri at spæla sín landsdyst nummar 109.

David Beckham fekk tíð til annað, enn at sóla sær í metinum. Hann legði eina neyva og góða sending inn til Wayne Rooney, sum skoraði til 2-0. Wayne Rooney skoraði eitt mál aftrat, meðan Emile Heskey og Frank Lampard skoraðu hini bæði málini.

David Beckham manglar tó enn 17 landsdystir, áðrenn hann tekur metið hjá gamla enska landsliðsmálverjanum, Peter Shilton, sum spældi 125 landsdystir fyri Ongland.



*Wayne Rooney skoraði tvær ferðir fyri Ongland – í øðrum førinum eftir upplegg frá David Beckham, sum leygarkvøldið setti met við 109 dystum á enska landsliðnum*



*Svensku miðverjarnir, Olof Mellberg og Daniel Majstorovic, vóru ein stór orsøk til, at Svøríki leygarkvøldið megnaði 0-0 á Estádio do Dragão í Porto*

# Norðurlendskt fótbóltskvøld

**Danmark og Finnland vunnu, og Svøríki fekk javnt í Portugal**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Úrslitini lagaðu seg væl hjá danska fótbóltslandsliðnum í HM-undankappingardystunum leygarkvøldið. Danmark vann 3-0 á Malta á Ta'Qali Leikvøllinum í Valetta, samstundis sum Portugal og Svøríki spældu 0-0 í einum dysti, har svenska verjan stóð væl.

Svenskarar kunnu kortini vera betur nøgdir enn portugisar, sum nú bert hava seks stig fyri fimm dystir í HM-undankappingarbólki 1, meðan Danmark hevur 10 stig fyri fýra dystir.

Søren Larsen skoraði tvey mál fyri Danmark tíðliga í dystinum, men so gekk long tíð, áðrenn Danmark aftur skoraði. Carsten Werge og Per Frimann hjá Viasat vóru samdir um, at hetta var keðiligasti undankappingdystur, teir høvdu dekkað.

Stutt undan leikloki spældi Jonas Borring Morten Nordstrand leysan, sum skoraði til endaliga úrslitið 3-0 til Danmark.

Finnland, sum stillaði við sjey spælarum oman fyri 30 ára aldur, vann ein góðan 2-0 sigur á Wales í Cardiff í undankappingarbólki 4. Jonatan Johansson og Shefki Kuqi skoraðu finsku málini.